## Chelsea leingir við verjuskansa



Sterki verjuleikarin hjá Chelsea, Ricardo Carvalho, var vegna skaða ikki við í FA Cup finaluni ímóti Manchester United leygardagin. Hetta forðar honum tó ikki at leingja sáttmálan við Chelsea, og tað hevur hann gjørt um vikuskiftið. Nýggi sáttmálin røkkur nú til summarið 2012.

Portugisiski landsliðsverjuleikarin kom saman við venjara José Mourinho til Chelsea frá FC Porto í 2004.

## Juventus aftur í Seriu A

Juventus varð í fjør sum partur av einari gølu flutt niður í Seriu B, men tað tók ikki felagnum meir enn eitt kappingarár at vinna seg upp í bestu deildina aftur. Við einum 5-1 sigri á Arezzo um vikuskiftið gjørdi Juventus bart, og vann Seriu B trygt við átta stigum niður til nummar tvey.

Við Juventus í bestu deildina flytur Genoa, sum somuleiðis bleiv flutt niður av gøluni. Hetta var tó fyri tveimum árum síðani, tá ið teir vórðu fluttir niður í Seriu C. Teimum hevur harvið eiheldur tørvað meir enn neyðugt at koma aftur í Seriu A.

# Greipan fór til Klaksvíkar

**Klaksvíkingar vunnu greipuna, tá seinna umfarið í FM-liðkappingini fyri skúlaungdóm var í Sandavági seinasta vikuskiftið**

**TALV**
*Tíðindaskriv*

Aftur hesuferð, var undirtøkan sera góð, og høvdu heili 23 lið meldað til.

Samanlagt vórðu tað sostatt aftur hesuferð uml. 100 skúlaungdómar sum sessaðust við talvborðini. Kappingin er býtt upp í tveir aldursbólkar: 5. flokkur og eldri og 4. flokkur og yngri. 4 telvarar eru á hvørjum liði, umframt upp til 2 skiftisleikarar.

FM-finalan verður 28. mai í Pállstovu í Tórshavn. Tá verða aldursbólkarnir, við støði í innleiðandi úrslitunum, býttir í tveir bólkar: FM bólkur og Opin bólkur. Hóast skúlar higartil ikki hava luttikið í innleiðandi kappingunum, ber til at melda luttøku í opna bólkinum, har somuleiðis verður telvað um heiðursmerkir og plaseringar

Spenningurin var sera intensur í SÍF-húsinum. Fyrra kappingin, sum var á Oyri, bar boð um tætta kapping um plaseringar í báðum bólkum. Stúgvandi fult av ídnum talvungdómi og áhugaðum - til tíðir stunandi - foreldrum og skúlalærarum. Talv er nakað heilt fyri seg.

Í eldra bólkinum gjørdu Klaksvíkingar bart. Úrtøkan gjørdist heili 5½ stig betri enn í fyrru undankappingini. Framgongdin tryggjaði teimum gullið. Hetta innibar samstundis, at FM vinnararnir frá í fjør, Havnin, endaði á 2. plássi, eitt stig aftari, meðan Sandavágur, sum annars hevði eina betri kapping enn seinast, endaði á 3. plássi. Vestmanna, sum vann bronsu seinast, gjørdist ov stuttir í oddastríðnum, og endaðu á 4. plássi.

Finaluumfarið verður sera spennandi í millum hesi 4 liðini, sum eru javnt sterk, og heilt greitt skara framúr samanlagt og har royndu unglingatevlararnir mynda FM-orrustuna. Og ivaleyst verður avgerðandi í finaluni, hvussu fremstu borðini standa seg. Higartil hevur Rógvi E. Nielsen staðið seg best við 100% skoru á 1. borði hjá Sandavági, meðan Margar Berg á Havnarliðnum, higartil, hvørki hevur megnað at bast Rógva ella Herborg Hansen úr Klaksvík, meðan Rúni Vørmadal úr Vestmanna hinvegin hevur tikið stig frá Margar og Herborg.

Opni bólkurin í finaluni hjá teim eldru, er somuleiðis uttan greiðar favorittar. Væntandi verður stríðið um plaseringar serliga ímillum Kollafjørð og Rókur (Oyri), meðan Haldarsvík eisini er ein kvalifiserað hóttan í stríðnum um medaljurnar.

Í yngra bólkinum gav seinna innleiðandi kappingin í Sandavági greiða ábending um, at FM kappingin er fullkomiliga opin. Sandavágur vann fyrru kappingina, men hesuferð vóru ungu klaksvíkingarnir eirindaleysir og vunnu greiðan sigur. Vestmanna hálaði seg úr 3. plássinum, uppá á 2. plássið, meðan Sandvágur vann bronsuna.

Skúlabørnini úr Kollafirði vóru aftur hesuferð sera drúgv, og enn einaferð restaðu bert 2½ stig, til tess at fáa hendur á bronsukrónunum.

Liðið úr Tjørnuvík, sum luttók á fyrsta sinni í hesum høpinum, var um reppið, at gera tað heilt stóru sensatiónina. Sum kappingin leið, vóru tey støðugt í oddastríðnum, men tá avtornaði, megnaði liðið eitt deilt 4 pláss, saman við Kollfirðingum, við 13 stigum. Einastandandi flott avrik, má sigast - soleiðis, at "skaka" tey meira siðbundnu talvøkini í landinum í fyrstu roynd-ini !

Í samanlagdu støðuni hjá teim yngru, eru Sandavágur og Klaksvík stavn um stavn, meðan Vestmanna er eitt vet aftari og Kollfirðingar liggja við 2 liðum klárir, at taka av avbjóðingina í finaluni. Men undan finaluna, verða stigini nullstillaði og byrjað verður á blonkum arki.

Í finaluni verður, eisini hjá teim yngru, avgerðandi, hvussu fremstu borðini standa seg. Orrustan verður sera hørð ímillum Ársins Stjørnuskot 2006, Høgna Egilstoft Nielsen, úr Sandavági, og evnaríka Heðin Gregersen úr Klaksvík. FM/NM luttakarar í rívandi menning. Eftir innleiðandi umførini stendur á jøvnum 1-1, teirra millum. Javnt sterka Vestmannaliðið, vísti av álvara FM-taktir í Sandavági sunnudagin og otar seg alsamt nærri oddinum. Eitt satt brak av einari finalu er í vantu !

Eftir eina laka fyrru innleiðandi kapping, sýnist Havnin at liggja væl fyri í FM kappingini í opna bólkinum, saman við Haldórsvík og Kollafirði. Tjørnuvík hevur bert luttikið í seinnu innleiðandi kappingini, men hinvegin við sera góðum úrsliti og børnini úr Vík hava ei heldur smæðst burtur. Alt bendur sostatt á eina ógvuliga áhugaverda – og ikki minst søguliga – FM talvorrustu í millum grannabygdirnar Vík og Tjørnuvík í finaluni !

**FM liðkapping 2007 fyri skúlaungdóm**

**Samanlagt innleiðandi úrslit (12 umfør)**

**4. flokkur og yngri**

| | | |
|---|---|---|
| 1-2 | Sandavágur | 35,0 |
| 1-2 | Klaksvík | 35,0 |
| 3 | Vestmanna | 32,5 |
| 4 | Kollafjørður | 27,0 |
| 5 | Kollafjørður 2 | 24,0 |
| 6 | Rókur | 22,5 |
| 7 | Havnin | 22,0 |
| 8 | Haldarsvík 2 | 19,5 |
| 9 | Haldarsvík | 19,0 |
| 10 | Kollafjørður 3 | 18,0 |
| 11 | Rókur 2 | 13,5 |
| 12 | Tjørnuvík | 13,0 |
| 13 | Sandavágur 2 | 12,5 |
| 14 | Klaksvík 2 | 9,5 |
| 15 | Hósvík | 9,0 |

**FM liðkapping 2007 fyri skúlaungdóm**

**Samanlagt innleiðandi úrslit (16 umfør)**

**5. flokkur og eldri**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Havnin | 51,5 |
| 2 | Sandavágur | 49,5 |
| 3 | Klaksvík | 47,5 |
| 4 | Vestmanna | 45,5 |
| 5 | Kollafjørður | 25,5 |
| 6 | Rókur | 25,0 |
| 7 | Rókur 2 | 20,0 |
| 8 | Haldarsvík | 16,5 |
| 9 | Kollafjørður 2 | 7,0 |

## Erla fingið sáttmála í Danmark



Erla Eliasen, sum í vetur hevur vart málið á besta kvinnuliðnum hjá Neistanum, fer komandi tvey árini at spæla við danska Team Sindal-Taars.

Erla var eitt skifti í starvsvenjing hjá danska liðnum, og tað var her, at venjararnir av álvara løgdu merki til góðu evnini hjá blaðunga málverjanum, sum eisini er partur av føroyska kvinnulandsliðnum.

Team Sindal-Taars spælir í donsku 2. deild.

-mørk

## ÍSB-svimjarar til Berlin

24. - 28. mai verður ein av størstu kappingunum í svimjing fyri brekað. Hendan eitur International German Swimming Championships og verður hildin í Berlin í Týsklandi.

Kappingin er um týska meistaraskapið, men altjóða luttøka er eisini á skránni. Svimjarar við breki koma úr øllum heiminum til Týsklands at kappast ímóti øðrum javnlíkum

Føroyar eru eisini við í hesi stóru kapping. Okkara svimjarar eru: Heidi Andreasen, Ragnvaldur Jensen, Apolonia Justesen, Osvald Hansen og Dann Akursmørk. Tilsamans eru tey við í 26 kappingum.

-mørk